# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## EINKI UTTAN SANNLEIKAN

Journalisturin Rachel Armstrong arbeiðir við einari søgu, sum kann tryggja henni Pulitzer heiðursløninа og kanska koppa amerikansku stjórnina. Men tá ið hon verður handtikin av FBI og noktar at avdúka, hvør hennara loyniliga kelda er, byrjar eitt nýtt stríð ímóti systeminum. Millum tey, sum spæla við í hesum filmi, eru Kate Beckinsale, Matt Dillon og Alan Alda.

**NOTHING BUT THE TRUTH**
dvd-filmur



## BITIN AV VAMPÝRUM

Blóðsúgvarar eru upp í tíðini, og sjónvarpsrøðin True Blood er ein av væl umtóktu filmaðu søgunum um vampýrar. Sendirøðin gongur fyri seg íe inum býi í Louisiana, har vanlig fólk og vampýrar liva saman. Sum verða mann verður ein ung kvinna skotin í einum vampýri, men tað er ikki bert einfalt. Fyrsta sesongin av True Blood fæst nú sum dvd-pakki.

**TRUE BLOOD – FYRSTA SESONG**
Dvd-pakki



## LESIRINGUR SAVNAST

Á Klaksvíkar Bókasavni hava tey lesiring, sum savnast við jøvnum millumbilum. Týskvøldið hava tey aftur tiltak á skránni, og tá fara tey at tosa um skaldsøguna Les Misérables hjá Victor Hugo.

**LESIRINGUR**
Klaksvíkar Bókasavn
Týskvøldið 26/1 k. 19.30

## FØROYSKUR DANSUR FYRI UNG

Dansitíðin er upp á tað hægsta, og fleiri serliga dansikvøld eru á skránni komandi tíðina. Eitt av teimum er dansikvøld fyri ung, sum verður í Klaksvík. Í Norðoyggjum hevur verið barnadansur í fleiri ár, og nú eru fleiri so stór, at barnadansurin er ikki nokk. Tí verður roynt at gera eitt ungdómskvøld, fyri at halda teimum og øðrum í somu støðu til dansin.

**FØROYSKUR DANSUR FYRI UNG**
Skálin í Klaksvík
Leygarkvøldið 23/1 kl. 19.30

## PIPAR & SALT Í HVONN LIVE

Leygarkvøldið verður ársins fyrsta Hvonn Live sending hjá Rás2 send. Hetta er live sending, sum verður send av Hvonn í Havn. Hesaferð vitja millum annað Pipar & Salt og føroyska songkvinnan Christal, sum eisini fer at framføra live.

**HVONN LIVE**
Rás2
leygarkvøldið 23/1
kl. 20.00






## FAVORITT-DREPARAR AFTUR UPP Á SPÆL

Leeds tók øll á bóli, tá ið felagið, sum spælir í triðbestu ensku fótbóltsdeildini, sendi Manchester United úr FA steypakappingini fyrst í hesum mánaðinum. Nú skal Leeds aftur royna seg, og hesaferð eru teir á útivølli ímóti Tottenham, sum telist millum sterkastu feløgini í Onglandi. Og so er spurningurin, um favorittdrepararnir kunnu gera um seg aftur.

**FA CUP FÓTBÓLTSDYSTUR**
Tottenham-Leeds
Kanal 6 leygadagin 23/1 kl. 17.15

## BÁRÐUR Í FOCUS

Listaummælarin Peter Michael Hornung skrivar um Bárð Jákupsson, at hann er er ekspressionistur eftir náttúrunnar treytum, og hann veit sum fáur hvussu tað málandi pensilstrokið er ført fyri á kalligrafiskan hátt bæði at sleppa tí gamla heiminum og avdúka ein nýggjan. Komandi fríggjadag letur upp framsýning við Bárður Jákupsson í Galerie Focus í Havn.

**BÁRÐUR JÁKUPSSON**
Galerie Focus
Fríggjadagin 29/1 kl. 16.00

